Anna Maria, fyrrverandi grikska drottningin:

Grikkaland er land mítt

Dóttir fyrrverandi grisku kongshjúnini, Alexia, dugir danska málið.

Papadopoulos tikin í eið sum fyrsti forseti Grikkalands.

Hon dugir danska málið.

Alexia prinsessa.

Og danir hava fingið prógv fyri hesum.

Fyrrapartin í hesum mánaði eydnaðist tað danska sjónvarpinum umsíður at skipa fyri stuttari samrøðu við nú frákoyrdu griksku kongshjúnini, Anna Maria og Konstantin.

Sjónvarpið hevur leingi ynskt at fingið í lag samrøðu við fyrrverandi griksku kongshjúnini, men hóast stjórin fyri útvarpið og sjónvarpið, Hans Sølvhøj, royndi at fáa slíka samrøðu til veruleika við at senda hetta ynski sjónvarpsins fram í bræv, kom ongantíð nakað svar.

Ongan áhuga

— Do you speak Danish, byrjaði sjónvarpið viðtalið við Alexiu, prinsessu.

— Eg havi ongan áhuga, svaraði Alexia.

— Hvat dugir tú at siga á donskum máli?

— Good day.

— Tú meinar góðan dagin?

— Ja. Stóra tøkk.

— Dugir tú at siga »tøkk fyri matin« á donskum?

— Ja!

— Tað er frálikt!

Hugsar bert um Grikkaland

Fyrsti spurningurin, sjónvarpið setti fyrrverandi drottningini Annu Mariu, var:

— Bera tygum sakn til Danmark?

— Veruliga ikki.

Eg eri ofta á vitjan í Danmark, men landið, sum eg veruliga beri sakn til, er egna land mítt, *Grikkaland*.

Og eg eri vitanðí um, at eg ikki gerist eydnusæl aftur, áður enn vit eru komin aftur hagar.

Eg hugsi altíð og stund um grikska fólkið og land tess.

— Hvussu er tilvera tygara í Rom?

— Ikki øðrvísi enn aðrar tilverur eru skapaðar.

Um morgnarnar veiti eg børnunum hjálp, áður enn tey skulu í skúla.

Somuleiðis fái eg undirvísing í grikskum máli frá sama lærara, sum hevur lært børnini móðurmál teirra.

Sjálvsagt hjálpi eg eisini manni mínum við øllum ti, eg kann.

— Duga tygum væl grikska málið?

— Eg haldi eg havi lært mál ið frálíka væl, og kann soleiðis skilja orðaskifti millum grikkar. Men tað er onki dulsmál, at málið er torført og at eg havi nógv eftir at læra.

— Men danska málið duga tygum framvegis?

— Sjálvsagt. Men við hvørt kann vera tvørligt at minnast aftur á røttu nýtsluna av málinum. Eg hugsi í hesum sambandi um ávísar orðafelli.

— Hvør skilpar fyri uppaling ini av børnum tygara?

— Vit hava tvær barnagentur.

Onnur er bretsk, og hevur hon verið í starvi hjá okkum í tilsamans sjey ár.

Hin er grikssk. Tað er neyðugt við grikskari barnagentu, at børnini kunnu halda móðurmálið við líka.

Av stórum týdningi

— Hjálpin úr Danmark hevur verið av alstórum týdningi. Bæði hvat NATO og EF viðvikja hevur Danmar gjørt skyldur sínar til fulnar mótvegis grikska fólkinum, segði frákoyrdi grikski kongurin, Konstantin, í samrøðuni við danska sjónvarpið.

— Eg vóni, segði frákoyrdi kongurin, at vit kunnu fara til Grikkalands, har samarbeiði kann verða millum parlamentið, dómstólarnar og fólkið.

Ja, hetta er sannføring mín.

Tikin í eið

Sunnudagin seinasta varð George Papadopulos tikin í eið sum fyrsti forseti Grikkalands. Landið hevur verið kongadømi í tilsamans 102 ár.

Í sambandi við, at forsetin varð tikin í eið, kimaðu kirkjuklokkur kring í landinum, eins og nøkur túsund fólk vóru sam ankomin at fagna forsetanum.


Kongadømið er avtikið.

Konstantin kemur ikki aftur til Grikkalands!



8 ára gamla Alexia — nú dugir hon eisini at tosa danskt.

BRØV



Hví ikki løgmaður?

Harra blaðstjóri!

Høvdu tygum viljað gjørt so væl og greitt okkum frá, hví Ólavsøkan ikki hevur verið sett á vanligan hátt seinastu árini. Fyrr var tað løgmaður (Kr. Djurhuus ella Hákun Djurhuus), sum setti Ólavsøkuna, men so var ikki í ár, heldur ikki í fjor og haldi eg heldur ikki í fyrraárið.

Ólavsøkan er mær kunnugt fyri allar Føroyar og ikki bert fyri Havnina, og tí má tað vera rímuligt, at tað er Føroya løgmaður, ið setur hátíðarhald ið heldur enn borgarstjórin í Havn, men hví er hendan broyting komin í — tað skuldi væl ikki verið av politiskum orsøkum — hetta megu vit ikki vóna, og verð tí henda mín áheitan bend til teirra, ið skipa fyri Ólavsøkuskránni, soleiðis at hetta kemur aftur í vanliga legu. — Annars má hetta vera ein spurningur fyri mann javnaðarflokksins í býráðnum, harra Leivur Johannesen, sum er formaður fyri Stadionnevndini. Ella hevur henda nevnd einki við Ólavsøkuna at gera? Hvussu er skránevndin vald? Er hon sjálvbestaltað ella fólka vald? Við tøkk fyri innivist.

Ólavsøku-gestir

Markleysur frekleiki

Fyrst nøkur orð um sendiskrá útvarpsins um Ólavsøkuna. T. d. fyri Ólavsøkudag stóð at lesa í útvarpsskránni: Kl. 1840. Ólavsøkan heldur fram. Hvat hoyrdu vit so frá 18.40 og fram til kl. 21.00? Í eina hálvan tíma legði Kári Mouritsen plátur á. Í eina annan hálvan tíma hoyrdu vit sumbingar kvøða. Eina ferð hoyrdu vit um hvat Ísborg hevði fiskað, hvar hon hevði roynt, hvussu langa roynd hon hevði havt, nær hon skuldi landa og hvørt av sínum. Hvar hevði alt hetta við Ólavsøkuna at gera? Hví hoyrdu vit einki frá Ólavsøku-kabareittini í kommunuskúlanum?

Alt gott at siga um pláturnar hjá Kára Mouritsen, um kvæðini hjá sumbingum og um veðrina hjá Ísborg. Men í sendiskránni hjá útvarpinum stóð, Ólavsøkan heldur fram. Tað gjørdi hon bara ikki. Pláturnar hjá Kára Mouritsen, kvæðini hjá sumbingum og veðan hjá Ísborg stóðu ikki í lýsu Ólavsøku-skránni. Hetta er at lýsa falska sendiskrá og at halda lurtarnar fyri tað turra spott.

Hetta er tó ikki alt, tað er verri enn so. Eg var staddur úti á bygd í summarfrí um Ólavsøkuna — fór triggjar dagar áðrenn Ólavsøku, t.v.s. 25. juli — kom heimaftur leygardagin 4. august. Hvat fann eg ikki í postinum? Eina rokning frá útvarpinum uppá útvarpsgjald 75,00 kr. og tað versta er ikki komið enn, har verður lagt aftrat, at um ikki er goldið áðrenn 1. august, skulu 2 kr. í sekt, leggjast aftrat teimum 75 kr.

Eg má spyrja, hvat er hetta fyri markleysur frekleiki útvarpið loyvir sær. Her á hásumri, tá stórur partur av fólki num náttúrliga er í summarfrí, at senda rokningar út seint í juli og krevja sektarpening frá fólki, um ikki er goldið áðrenn 1. august. Tað eru ikki tær tvær krónurnar, sakin snýr seg um, men mátin.

Men hetta er tó einki nýtt. Øll minnast, hvussu útvarpið eitt annað árið sendi rokningar út uppá eitt hækkað útvarpsgjald, sum tó ikki var góðkent av avvarðandi myndugleikum. Men got er, gjaldi bara, fyri peningin fáa vit jú hópin av endursendingum.

Við tøkk fyri upptøkuna.

illur lurtari

* * *

Trygdartiltøk á flótibrúgvum

Harra blaðsjóri!

Í vón um at onkur av skilamennunum í Klaksvíkar býráð lesir heiðraða blað tygara, fari eg at biða um innivist í blaðnum fyri tøkrum ávarandi orðum til Býráð Klaksvíkar býráðs.

Lat meg fyrst siga, at ongan tíð áður hevur verið tilikt fyritaksemi á tí almenna og kommunala økinum, her í Klaksvík, sum júst í hesum árum. Hetta skulu ágrýtnir, virkisfúsir og dugnaligir býráðslimir við teirra dugnaliga og intuitiva ríka formanni á odda, saman við løgtingi og landsstýri, hava mikla tøkk fyri.

Eitt av teimum mongu arbeiðunum, sum í hesum døgum verða gjørd, eru tær sonevndu flótibrúgvarnar, ið beint nú eru útlagdar. Hetta er nýtt tiltak her hjá okkum og er tí ókent og óroynt, so sigast má, at býráðið hevur sýnt óforvitni, tá farið varð undir at realisera hesa ætlan. Í skrivandi stund eru so gott sum allar brúgvarnar útlagdar, og væl taka tær seg út, nú tær er komnar at liggja, og vónandi fara vit eisini sum fráliður, tá tær eru nakað royndar, at ásanna, at tær roynast væl til endamálið.

Tað var viðvíkjandi hesum brúgvum eg ætlaði at koma við eini ávaring og nøkrum vegleiðandi orðum. Siglingarmaður, ið er heima í summarfrí, segði nú ein dagin tosað varð um hesar brúgvar, at hetta slagið verður nógv brúkt aðrastaðir, t.d. í USA, men — skoytti hann uppí — brúgvarnar hava mang an roynst sannar deyðsfellur fyri børn. Brúgvarnar eru smalar, útgjørdar við totum henkrum at binda bátarnar í, og eru hesar lættar at detta um hjá honum, sum er óansin og ikki vísir neyðugt varsemi, og sum øllum kunnugt eru børn óansin, skulu ofta renna um kapp o.s.fr.

Til tess at fyribyrgja vanlukkur av hesum slagi, seta teir aðrastaðir ymisk trygdartiltøk í verk. Vanligt er, at seta høga